Hiddenfjord
In harmony with nature

Viðmerkingar til uppskot til veðurlagslóg

Hiddenfjord takkar fyri høvið at gera viðmerkingar til lógaruppskotið um veðurlagslóg. Vit hava lisið uppskotið við stórum áhuga og stuðla grundtankanum um, at Føroyar skulu seta sær bindandi mál fyri at minka útlátið av vakstrarhúsgassi og røkka netto null í ár 2050.

Í Hiddenfjord er okkara greiða fatan at fyritøkur og tjóðir, ið hava ráð, skulu taka hesa álvarsligu og vaksandi veðurlagskreppu í álvara og veruliga raðfesta skjót og munagóð átøk fyri at minka um útlátið. Vit stuðla tí, at Føroyar seta bindandi veðurlagsmál, men tað er alneyðugt, at arbeiðið verður lagt soleiðis til rættis, at vinnan kann átaka sær ein týðandi leiklut at minka útlátið.

Sum ein av størstu vinnugreinum í landinum og ein av teimum, ið brúka nógva orku, hevur alivinnan ein avgerandi leiklut í grøna orkuskiftinum.

Alivinnan er longu komin langt ávegis – m.a. við at leggja um til elriknar skipanir so sum landstreym til fóðurflakar, elriknar hitaskipanir og elbilar – men hesar umleggingar krevja stóra elveiting, kappingarføran elprís og atgongd til varandi orkukeldur.

Lógaruppskotið
Lógaruppskotið ásetur eitt mál og *einans* eitt átak. Málið er, at Føroyar skulu hava netto null útlát í 2050. Átakið er at seta á stovn óheft Veðurlagsráð við serfrøðingum, sum Fróðskaparsetrið útnevnir, og landsstýrisfólkið velur. Ráðið skal gera tilmæli um veðurlagspolitisk átøk – *virkisætlanir* - og varpa ljós á og luttaka í almennum orðaskifti um veðurlagsbroytingar.

Lógaruppskotið vantar heimildir, sum tryggja framgongd
Hvussu langtíðarmálið skal røkkast og hvussu skjótt orkuskiftið skal ganga, er tí framvegis eitt politiskt mál har eitt nú støða má takast til, hvussu nógv átøk skulu setast í verk í senn, hvørji tey skulu vera, hvør skal gera mest, minst, og hvør skal fremja orkuskiftið fyrst, skjótast, osfr.
Ei heldur verður nakað slag av revsing nevnt, um málið ella deilmálini ikki verða rokkin, tí seta vit spurnartekin við hvussu bindandi lógin í veruleikanum er.

Munagóð átøk, heldur enn háfloygd mál
Lógin eyðmerkir ikki, *hvussu* langtíðarmálið skal røkkast, men ásetur bert *hvat* langtíðarmálið er. Lógaruppskotið hevur verið ávegis í longri tíð, og tí er tað sera harmiligt at onki verður nevnt um *hvussu* vit røkka málinum. Somuleiðis fílast vit á, at fyrstu átøkini ikki vera løgd fram saman við veðurlagslógini. Hetta hevði víst, at politiska skipanin tekur veðurlagsspurningin í størri álvara.

Viðmerking til §4 stk. 2.
"Landsstýrisfólkið ráðførir seg við týðandi áhugapartar tá virkisætlanir verða dagførdar"
Orkuskiftið krevur breitt samstarv millum almenna og privata geiran, og vinnan eigur at verða tikin við í arbeiðið, áðrenn ráðgeving og tilmæli verða løgd fyri politisku skipanina til støðutakan.

Uppskot til framtíðar átøk

Tann, ið dálkar, skal gjalda
Eitt CO2-avgjald kundi verið sett í verk, og har gjaldið verður oyramerkt til átøk at minka um útlátið. Hetta førir við sær, at tað merkist fíggjarliga at dálka. Ein skipan við CO2-avgjaldi er tó treyta av, at tey sum dálka, fáa nøktandi karmar, soleiðis at hesi kunnu gera neyðugu átøkini, fyri at minka um sína dálking.

Taka burtur fótonglar
Samfelagið skal elektrifiserast. Samstundis síggja vit, at tað gongur alt ov seint at økja um framleiðslu av eli úr varandi orkukeldum. Hetta er ein stórur trupulleiki, sum vit mugu loysa um nøkur vón skal vera um at røkka málinum. Ein forðing hjá orkutungum vinnufyritøkum er, at hesar ikki fáa loyvi at taka ábyrgd og framleiða elorku úr vindi.

Ítøkiligt tilmæli
Vit mæla til at eitt av átøkunum í fyrstu virkisætlanini verður, at skipanin loyvir el-framleiðslu til egna nýtslu við vindmyllum uttan útboð, og har knýtast kann í elnetið hjá SEV móti røttum gjaldi. Ein slík loysn kann henda skjótt og vil viðvirka til at útlátið minkar nógv.